## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og norði og sólglottar, men kanska okkurt vátakavaælið. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 6 stig , um næturnar um frostmarkið.

**Veðrið mánaadagin og týsdagin:**
Mánadagin lot av útnyrðingi, turt og sólglottar, hitin millum 2 og 5 stig. Týsdagin frískar hann vindin av útsynningi og møguliga regn. Lýggjari.

**Februar var ógvulig lýggjur 5,0° móti 3,7° sum er miðal yvir 30 ár. Avfallið var 95 mm móti meðal 114,7 mm.**

# LÍV keypir helmingin av Fastogn frá SMS

**Nú eiga Eikgrunnurin og Føroya Lívstrygging fastognarfelagið P/F Fastogn, sum eigur nógva bygnar í Føroyum, eitt nú SMS**

VINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

P/F Fastogn, ið er Føroya størsta fastognarfelag, hevur nú eina nýggja eigarasamanseting. Tað er greitt, eftir at SMS hevur selt sín helming av felagnum til Føroya Lívstrygging. Hin helmingin, sum Kaupthing átti, eigur Eikgrunnurin.

P/F Fastogn eigur nógvar bygningar í Føroyum, millum størustu aktivini eru bygningurin hjá SMS og Handilskjarnin í Havn.

- Eftirlønarfeløg gera vanliga íløgur í fastogn, men higartil hava vit í minni mun gjørt íløgur í føroyska fastogn. Tí vilja vit fegin gera hesa langtíðaríløguna í eina sera væl rikna fyritøku við góðum menningarmøguleikum, sigur Tummas Eliasen, stjóri í LÍV í tíðindaskrivi frá EIk.

Hann heldur, at keypið av helminginum av fastogn hóskar væl til virksemisprofilin hjá LÍV.

- Okkara felag fæst fyrst og fremst við handil, og tí hóskar tað sera væl, at LÍV nú keypir okkara ognarpart í P/F Fastogn. Nú hava vit størri rásarúm at reka høvuðsvirksemið hjá P/F SMS, sigur Niels Mortensen, ið sær íløguna í P/F Fastogn sum eina góða langtíðaríløgu.

Partarnir vilja kortini ikki upplýsa keypsprísin.

Kristian Petersen, leiðari á Eik Investment Bankin, ið hevur staðið fyri handlinum, sigur, at leiðslan í felagnum heldur fram. Evy Jacobsen er stjóri í Felagnum.

Eftir handilin eru tað Eik Grunnurin og Føroya Lívstrygging (LÍV), sum eiga P/F Fastogn við 50 prosentum í part.

P/F Fastogn varð stovnað í 2003. Felagið fæst við íløgur í fastogn, bæði keyp av verandi bygningum og gerð av bygningum við útleigan fyri eyga.



### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -24 |
| Nuuk | -17 |
| Qaqortoq | -15 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 8 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 16 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 981 hPa. eystan fyri Ísland grynnist.




**Í dag:**
Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum stendur mestsum í stað. Hátrýstið í útsynning úr Íslandi breiðir seg spakuliga móti Íslandi og gevur høgætt á okkara leiðum um vikuskiftið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 9/3 kl. 06[00] – 10/3 06[00]. Hitin í gjár: 3,5°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 9/3 kl. 06[00] – 10/3 06[00].
Avfallið higartil í mars: 62 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

7. mars — Tendring
10. mars — Mánin næstur jørðini
14. mars — Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. mars | 10.03 | 22.32 | 09.03 | 21.32 | 09.18 | 21.47 | - | 12.03 | 00.35 | 13.03 | 08.18 | 20.47 | 07.18 | 19.47 | 10.18 | 22.47 | 11.18 | 23.47 | 09.48 | 22.17 | 11.03 | 23.32 |
| 13. mars | 11.01 | 23.31 | 10.01 | 22.31 | 10.16 | 22.46 | 00.32 | 13.01 | 01.32 | 14.01 | 09.16 | 21.46 | 08.16 | 20.46 | 11.16 | 23.46 | - | 12.16 | 10.46 | 23.16 | - | 12.01 |
| 14. mars | - | 12.15 | 11.15 | 23.59 | 11.30 | - | 01.31 | 14.15 | 02.32 | 15.15 | 10.30 | 23.14 | 09.30 | 22.14 | - | 12.30 | 00.46 | 13.30 | - | 12.00 | 00.31 | 13.15 |
| 15. mars | 00.59 | 13.42 | - | 12.42 | 00.14 | 12.57 | 02.59 | 15.42 | 03.59 | 16.42 | 11.57 | - | 10.57 | 23.41 | 01.14 | 13.57 | 02.14 | 14.57 | 00.44 | 13.27 | 01.59 | 14.42 |
| 16. mars | 02.26 | 14.53 | 01.26 | 13.53 | 01.41 | 14.08 | 04.26 | 16.53 | 05.26 | 17.53 | 00.41 | 13.08 | - | 12.08 | 02.41 | 15.08 | 03.41 | 16.08 | 02.11 | 14.38 | 03.26 | 15.53 |